## Bayern flúgvandi

Týska stórfelagið FC Bayern fekk keðiliga byrjan í hesum kappingarárinum, men júst nú er liðið flúgvandi. Í farnu viku vann Bayern avgerandi Champions League dyst á útivølli ímóti Juventus, og um vikuskiftið hølbvdaði Bayern Bochum av í týsku landskappingini. Bayern legði seg á odda heili 5-0 í dystinum áðrenn Bochum svaraði aftur við einum máli. Seinastu tveir dystirnar hevur Bayern vunnið samanlagt 9-2.



## Eingin kreppa í Chelsea

Chelsea hevur fingið vánalig úrslit seinastu vikuna, men venjarin hjá felagnum tekur tað heilt róligt. Carlo Ancelotti heldur, at eingin orsøk er at tosa um kreppu á liðnum.- Hvør sigur, at vit eru í kreppu? Eg haldi tað í øllum førum ikki. Vit spældu væl ímóti Everton leygardagin, men vit fingu bert javnleik. Soleiðis er fótbóltur við hvørt, sigur Carlo Ancelotti sambært enskum miðlum. Chelsea liggur framvegis á odda í Premier League – trý stig frammanfyri Manchester United.

# Vónbrotið í Istanbul

**Tað gjørdist ikki til evropeiskt heiðursmerki og nýtt føroyskt met til Pál Joensen í Istanbul leygardagin, sum væntað varð frammanundan. – Men tað er ein góð kensla, at vit eru ónøgdir við ein føroying, sum fær eitt sjeynda pláss í eini evropameistarakapping, staðfestir Jón Hestoy, formaður í Svimjisambandinum**



Tá er eitt vónbrot, at tú »bert« er tann sjeyndi-besti í Europa, er málið í øllum førum av slíkum slag, sum tey flestu bert kunnu droyma um



uni@sosialurin.fo

Uni Holm Johannesen

- Tað er eingin loyna, at Svimjisambandið, Pál Joensen, Jón Bjarnason og onnur við, høvdu sett nøsina upp eftir meira. Men soleiðis kann tað ganga.

Pál Joensen var júst farin úr hylinum, tá Jón Hestoy, formaður í Svimjisambandinum, hugtungur noyddist at staðfesta í Kringvarpinum, at vágbingurin hevði verið eitt vónbrot í evropameistarakappingini í 1500 metrum.

Pál Joensen kom á málið sum nummar sjey. Bara Vitary Romanovic var aftanfyri. Ikki eitt nøktandi úrslit, tí tað varð væntað nógv meira. Tað staðfestu Terji Nielsen, Rói Joensen og Hanus Højgaard, ítróttarviðmerkjarar, væl og virðiliga í sendingini Studio 2 hjá Kringvarpinum fríggjakvøldið.

- Gull ella silvur. Og helst nýtt føroyskt met, vóru metingarnar hjá teimum trimum.

Men soleiðis skuldi tað als ikki ganga.

### Misti tamarhaldið

Á geil seks í einum svimjihyli í Istanbul, ger Pál Joensen seg til reiðar at bjóða heimsinsbestu av í 1500 metrum. Tað er leygardagurin 12. desember. Vágbingurin bíðar bara eftir byrjunarskotinum. Kappingarneytarnir Federico Colbertaldo og Mads Glæsner, sum hann hevur togast við fleiri ferðir áður, standa somuleiðis til reiðar. Nú skal tað verða. So kemur skotið. Dreymurin um evropeiskt gull til Føroyar er avgjørt tilstaðar, nú vágbingurin fer til stroks í rumenska høvuðsstaðnum.

Mads Glæsner bítur av álvara frá sær beinanvegin, men Pál Joensen vil treyðugt lata danan sleppa avstað. Fyrsta triðingin av teininum er vágbingurin í hølinum á Glæsner. Men so brádliga skrædnar millum teir.

Jan Wolfgarfen og Federico Colbertaldo fara nú at berjast við danan, meðan Pál Joensen nærmast hyggur at. Teir svimja leysir av miðbólkinum. Wolfgarfen. Colbertaldo. Glæsner. Og so kunnu hinir kappast um restina.

Pál Joensen kemur á málið við tíðini 14.38.00. Góð seks sekund frá hansara føroyska metið, og 18 sekund eftir Jan Wolfgarfen, sum tryggjar Týsklandi gullið.

### Góð kensla

Hvørki Pál Joensen ella Jón Bjarnason kunnu vera nøgdir við úrslitið leygardagin. Tí soleiðis kappast teir. Ongantíð verða nøgdur, men syrg fyri at gera tað betur næstuferð. Líkamikið úrslitið.

Men Jón Hestoy heitir staðiliga á, at vit ikki skulu undirmeta kensluna, vit sita við í løtuni.

- Tað er ein góð kensla, at vit eru ónøgdir við ein føroying, sum fær eitt sjeynda pláss í eini evropameistarakapping. Tað er eitt frálíkt úrslit, um vit ikki høvdu væntað meira, staðfestir Jón Hestoy, formaður í Svimjisambandinum.

### EM-finalan í 1500 metrum

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Jan Wolfgarfen | Týskland | 14.20.44 |
| 2 | Federico Colbertaldo | Italia | 14.25.68 |
| 3 | Mads Glæsner | Danmark | 14.26.74 |
| 4 | Sebastian Rouault | Frakland | 14.30.58 |
| 5 | Marcos Rivera Miranda | Spania | 14.32.56 |
| 6 | Christian Kubusch | Týskland | 14.37.28 |
| 7 | Pál Joensen | Føroyar | 14.38.00 |
| 8 | Vitary Romanovic | Russland | 14.41.05 |

# Giggs er ársins ítróttarmaður

**Veteranurin hjá Manchester United varð í gjár kosin sum største ítróttarpersonligheit í Bretlandi**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Tað er enska BBC, sum stendur fyri kjósanini av ársins ítróttarprofili, og aloftast fellur valið her á persónar, sum hava gjørt seg galdandi í einstaklingaítrótti.

Hesa ferð gjørdist talan tó um ein fótbóltsspælara, og tá tað skuldi vera, so var Ryan Giggs eitt upplagt val.

36 ára gamli spælarin er eitt satt unikum í dagsins útgávu av fótbóltsspælinum. Hann hevur sum spælari bert umboðað Manchester United, og tað er ikki smávegis hann hevur vunnið hesi seinastu 20 árini. 11 Premier League-heiti og tveir Champions League-sigrar standa millum annað á visit-kortinum hjá spælaranum, sum eisini hevur metið sum tann, ið hevur spælt flestar dystir fyri Manchester United.

Sjálvur var Giggs ovurfegin og mest sum málleysur, og einastu orðini, sum hann fekk fram, tá hann skuldi halda takkarrøðu sína, vóru »Eg eri skelkaður«.

Tað var liðfelagin, Paul Scholes, hinvegin ikki.

- Hann er besti spælarin, sum Manchester United nakran tíð hevur havt. Hann hevur verið í felagnum í 20 ár, og hann framvegis eins góður, sum hann nakrantíð hevur verið, staðfesti Scholes.

Í kapprenningini um heitið vóru eisini heimsmeistarin í Formel1, Jenson Button, og heimsins besti sprintari, Mark Cavendich, og eitt nú fanst the Guardian harðliga at valinum.

- Hann er fantastiskur ítróttarmaður og ein framúr fyrimynd. Men hesa virðislønina hevur hann fingið í sympati, nú yrkisleiðin nærkast endanum. Var hann betri enn nakar annar á vøllinum í ár? Svarið er nei. Var eg Mark Canvendich, hevði eg sparkað hart til eitthvørt, stóð millum annað í viðmerkingini hjá blaðnum.



36 ár er eingin aldur hjá Ryan Giggs, sum í gjár varð kosin ársins ítróttarmaður í Bretlandi. Í øllum førum hevur hann nú eisini fingið nýtt sáttmálatilboð frá Manchester United